## 16. SIGMUNDUR FÆR RINGIN

Tað skilst, sum Sigmundur nú hevur havt stóra trá at sleppa heim aftur til Føroya. Har livdi móðir hansara, har livdu øll tey, hann var góður við, og honum mundi leingjast eftir at síggja støðini, har hann hevði slitið sínar barnaskógvar. Eisini vóru tað menn, hann kundi havt hug at hitt; tí tað var brigslað honum, at hann ikki hevði hevnt deyða faðirsins, og tað var ein stór skomm eftir heidnamannahugsan.

Skipini, hann skuldi fara við til Føroya, vóru nú liðug. Nú var einans eftir at fáa um borð tað, teir skuldu brúka til ferðina, og tað var ikki so lítið; tí tá ið saman um kom, var hetta ein herferð.

Hákun jallur kemur tá til Sigmund og spyr, hvønn hann trýr uppá. «*Eg trúgvi á mátt mín og megi,*» svarar Sigmundur Hetta dámdi jallinum einki, og hann biður Sigmund koma við sær. Teir fara inn í skógin, koma fram at eini tvørgøtu, fylgja henni, til teir koma fram til eini ovurhonds vøkur hús; hetta var húsið hjá gudinnuni *Torgerð Hørðabrúður*. Teir fara inn og síggja eina prýðiliga kvinnu inni í høllini; eisini er har nøgd av gudamyndum. Jallurin sýnir Sigmundi ein dýran ring, ið kvinnan ber, og sigur við hann, at henda ringin vildi hann unna honum, tí so var eydnan honum vís. Jallurin tveitir seg niður fyri føtur hennara; síðan reisist hann og sigur við Sigmund, at teir skulu bera henni offur í silvuri. Tá ið tað er gjørt, trívur jallurin eftir ringinum, hon ber, men hon knýtir nevan saman, at hann ikki skal fáa hann. Sigmundur sær tá jallin at tveita seg niður fyri føtur hennara á øðrum sinni, og hann sær tár renna úr eygum jalsins. Tá ið hann so rættir



Sigmundur og jallurin hjá Tórgerð.
*(Ing. av Reyni)*

seg upp aftur aðru ferð og skal taka eftir ringinum, er hann leysur.

Henda ringin gevur so jallurin Sigmundi og biður hann aldri at skilja seg av við hann. — Hetta játtaði Sigmundur honum.

So skiljast teir. Sigmundur fer til Føroya við báðum skipunum. Hann hevur Harald Jarnheys á skipi sínum; hinum farinum stýrir Tóri.

*Arbeiðsuppgávur:*

1. Hvat dró huga Sigmundar heim aftur til Føroya?
2. Hvat sigst um trúgv Sigmundar?
3. Hvønn setti Hákun jallur treyst sítt til?
4. Sig frá, tá ið Sigmundur fekk ringin!
5. Sig frá lyftinum, Sigmundur tá gav!

## 17. STØÐAN HEIMA Í FØROYUM

Skip sigldu av og á millum Føroya og Noregs, og tíðindini um raskleika Sigmundar vóru eisini komin til Føroya. Tað vóru ikki øll, ið vóru so fegin við hesi tíðindi, og summi fóru at bera ótta fyri, at Sigmundur onkun dagin fór at koma heim aftur.

Tróndur í Gøtu var, sum vera man, heldur ikki so fegin um framgongd Sigmundar. Hann hevði nú í mong ár verið mætasti maður í oyggjunum. Eftir deyða skúvoyarbrøðranna býtti hann oyggjarnar í helvt og læt *Øssur*, son Havgríms, fáa annan helmingin at ráða yvir; men tað var hvørjum manni greitt, at Øssur formáddi sær lítið móti honum. Tað var tí Tróndur, ið hevði buktina og báðar endarnar.

Øssur er eisini farin at óttast fyri, at Sigmundur fer at koma heim aftur, og hann ger seg til reiðar at taka ímóti honum. Hann ger sær eitt verndarvirki um garðin, hann hevði tikið aftan á brøðurnar í Dímun. Tá ið hann ferðaðist millum høvdingasetur síni, hevði hann altíð einar tjúgu mans við sær, og heima á garðinum hevði hann tríati mans; hann var sostatt altíð førur fyri at verja seg, um á stóð.



Øssur ger sær verndarvirki um garðin.

*(Ing. av Reyni)*

Øssur visti, at Dímun var staðið, ið lættast var at verja, og tað tyktist, sum hann helst hevur dvølst har. Um har varð hildið gott vaktarhald niðri við uppgonguna, kundi oyggin ikki takast. Tí var tað av største týdningi at hava vaktarmann har niðri bæði dag og nátt, so varskógvað kundi verða, um vandi var á ferð.

Men henda vaktartænasta tykist at hava verið ov lin. Ið hvussu er stevnir Sigmundur eina náttina inn ímóti Dímun; har er eingin á varðhaldi, og teir fáa tí lent og sloppið sær upp á oynna í øllum góðum. Ikki var langt frá hundrað monnum, ið fylgdu honum. Tá ið teir koma niðan til garðs, eru Øssur og menn hans á virkinum. Har kom til bardaga, og Øssur og ein annar av fylgi hansara lótu lív.

Sigmundur hevði tá longu verið í Svínoy og herjað á garðin hjá Bjarna. Tá minti Bjarni hann á, hvussu hann bjargaði honum og Tóra, frænda hansara, á sinni, tá ið Tróndur ætlaði at drepa teir. Hetta mintist Sigmundur væl. «Nær skal tað verða afturlønt?» spyr Bjarni. «Nú,» svarar Sigmundur; «tú skalt hava lív og grið.» Tá ið Sigmundur fór haðani, læt Bjarni hann fáa eitt lið upp á fimti mans, og hetta liðið hevði Sigmundur við, tá ið hann herjaði á Dímun.

Sigmundur herjaði ikki á Tróndi í Gøtu, men sendi honum boð at koma til fundar á tingstaðnum í Tórshavn.

Tann dagin, ið fundurin skuldi vera, var stór mannfjøld komin saman. Lagið á Tróndi tóktist at vera av tí besta. Tróndur ásannaði,



Stór mannfjøld komin saman á tingstaðnum
í Tórshavn.

*(Ing. av Reyni)*

at hann hevði sýnt ein atburð, ið ikki sømdi seg ímóti næstu frændum sínum, og biður Sigmund sjálvan døma í sakini teirra millum; men hvussu dómurin so fall, so vildi hann tilskila sær tvinni rættindi: onnur vóru, at hann skuldi hava rætt at liva í oyggjunum, hini vóru tey, at hann skuldi framvegis hava tað ræðið, hann nú átti.

Sigmundur sýtti at døma; hann skeyt dómin inn fyri Hákun jall, og avgjørt varð, at teir komandi summar skuldu fara til Noregs. So fór hvør til sín.

Líður nú veturin, og tá ið tekur at sumra, búgva báðir partar skip síni út til noregsferð.

So leggur Sigmundur av stað. Ferðin gongst væl, og hann kemur í øllum góðum til Noregs; hann hittir Hákun jall og sigur honum frá, hvussu alt var farið fram millum hann og Trónd.

Tíðin gongur, men har kemur eingin Tróndur. Tá koma tey tíðindi, at skip Tróndar á leið til Noregs var komið út í ódnarveður, og tað var so illa løstað, at Tróndur noyddist at venda aftur til Føroya.

Hákun noyddist so at siga dómin, hóast Tróndur ikki var hjá. Hann dømir Trónd at rinda stórar bøtur fyri drápið av brøðrunum og drápsroyndir móti teimum frændunum.

Hvat ið ræðinum í Føroyum viðvíkti, gjørdi hann av, at oyggjarnar skuldu býtast í helvt; Sigmundur skuldi hava aðra helvtina, jallurin hina, men Sigmundur skuldi stýra teimum báðum.

Tá ið Sigmundur várið eftir fer heim til Føroya, ber hann hesi tíðindi við sær. Sjálvandi vórðu tey illa dámd av Tróndi, og hann royndi at andøva ímóti; men hann noyddist kortini í endanum at lúta, um hann gjørdi tað treyður.



Skinnbók. Í eina sovorðna skinnbók er Føroya søga skrivað.
*(Fotomynd úr Keypmannahavn)*

Sigmundur gjørdi nógvar noregsferðir, og einaferð hann var har yviri, stóð brúdleypið hjá honum og Turid. Eisini eydnaðist honum at fáa sátt fyri Torkil, fosturfaðirin, sum kom at fáa sýslumansstarv í einum bygdarlag úti í *Orkadáli*.

Á eini noregsferð hansara varð Noreg álopið av *jómsvíkingunum*. Sigmundur og Tóri, frændi hans, fóru við jallinum í bardaga. Jallurin vann; men tað var eingin av monnum hansara, ið kom Sigmundi nær í dirvi og reystleika. Jallurin lønaði honum væl, og tá ið hann og Tóri nú fóru heim til Føroya, fingu teir ríkar gávur við skilnaðin.

Hetta tykist at vera seinastu ferð, teir og jallurin hava hitst.

Ikki langa tíð eftir hetta varð Hákun jallur myrdur av einum træli sínum.

*Arbeiðsuppgávur:*

1. Fyri hvørjum manni bóru føroyingar ótta?
2. Hvør hevði mesta valdið í Føroyum?
3. Greið frá besta verndarstað í Føroyum!
4. Sig frá fundi Sigmundar við Svínoyar Bjarna!
5. Hvussu kom avgerðin at vera millum Sigmund og Trónd?
6. Greið frá dómi Hákun jals!
7. Sig frá lagnu Torkil Turrafrosts og Hákun jals!

# 18. SIGMUNDUR VERÐUR KRISTNAÐUR

Meðan hetta fer fram, er friður í Føroyum. Av og á hevur tað tó hug at prutla undir lokinum, og tað er millum Trónd og Sigmund, hesin tvídrátturin er.

Heim á garð sín í Gøtu hevur Tróndur fingið ein fosturson; tað er *Leivur Øssurson*, hvørs faðir Sigmundur tók av døgum, tá ið hann herjaði Dímunargarð. Tróndur kravdi Sigmund at rinda Leivi mansbót fyri at hava dripið faðir hansara, og Tróndur segði seg ikki vilja rinda tær mansbøtur, ið hann var dømdur at gjalda fyri Brestir og Beinir, um somu sømdir ikki vórðu veittar Leivi, og tað var hetta, ið tvídrátturin stóð um.

Um hetta mundið hevur Noreg fingið nýggjan kong, ein kristnan kong, ið nevndist *Ólavur*



Sigrid mælti: «Hetta man koma tær aftur um brekku!»
*(Mynd úr Heimskringlu)*

*Trygvason.* Hann stríddist nógv fyri at kristna Noreg, men hann fór ógvuliga harðliga fram.

Um somu tíð sat í *Sviaríki* ein drotning, ið nevndist *Sigrid stórráða;* hon sat einkja. Ólavur ætlaði sær at giftast við henni; men hon helt fast við teir gomlu gudarnar og vildi ikki gerast kristin. Tá fleyg sinni í Ólav, hann sló hana í andlitið við handska sínum og segði: «Hvat havi eg at gera við teg, tín heidni rakki!» Tá leyp Sigrid á føtur og segði: «Tað kundi hent seg, at hetta kom at vera tín bani.»

Henda giftan varð so av ongum; tað kom at vera *Týra,* systir danakongin Svein Tvískegg, ið gjørdist Noregs drotning.

Ólavur Trygvason fer so at hugsa um at fáa kristnað Føroyar. Hann sendir boð eftir Sigmundi, og tá ið hesin kemur til Noregs, er hann bæði blíður og týður við hann.

Hann kemur á tal við Sigmund og sigur honum frá barnaárum sínum, hvussu hann noyddist at rýma heimanífrá fyri óvinum og øvundarmonnum, sum kortini vóru hansara næstu frændur. Hann segði frá, hvussu hann var hertikin av víkingum; trý ára gamal varð hann skildur frá mammuni, og hann sá hana ongatíð aftur. Hann varð seldur sum trælur bæði tvær og tríggjar ferðir, og ta einu ferðina varð ein geitabukkur rindaður fyri hann.

Men nú hevði hann at enda ognast faðirarv og fosturland, eins og Sigmundur hevði gjørt tað heima í Føroyum.

Síðan fer Ólavur at røða um *Hvítakrist,* røða um *hin góða Gud,* ið situr á himni hátt, talar um tey óndu og staðið, tey koma til niðri í Helheimi. Kongur talar væl, og hóast Sigmundur onkuntíð mundi hava hoyrt um



Sigmundur verður kristnaður.
*(Ing. av Reyni)*

hesa nýggju læruna, gerst hann nú so hugtikin av henni, at hann letur seg doypa og allir menn hansara við honum.

Henda veturin dvaldist Sugmundur í Noreg, fyri at hann og menn hansara kundu gerast meira kendir við hesa nýggju læruna.

*Arbeiðsuppgávur:*

1. Hvat kravdi Tróndur av Sigmundi?
2. Sig eitt sindur frá nýggja norska konginum!
3. Nevn eitt annað land, hann ætlaði at kristna!
4. Sig frá fundi kongs og Sigmundar!
5. Hvussu endaði fundurin?

## 19. SIGMUNDUR BER KRISTNIBOÐINI TIL FØROYA



Sigmundur ber fram kristniboðini á Tinganesi í Tórshavn ár 999.

*(J. Waagstein)*

Tá ið tók at vára, heitti kongur á Sigmund at fara heim til Føroya at kristna fólkið. Sigmundur hevði ongan hug at gera hesa ferð; men til endan játtar hann tí kortini.

Hann fær prestin *Tangbrand* og aðrar kristnar menn við sær, og so leggur hann í havið.

Hann kemur til Føroya í øllum góðum, og síðan stevnir hann bóndunum til tings í Tórshavn. Tað var, sum fólkið kendi tað á sær, at nakað stórt og týdningarmikið var í umbúna, og har kom ein ógvuliga stór mannfjøld saman.

Sigmundur stígur fram á tinginum og byrjar at tala. Fyrst ber hann teimum heilsu frá kongi teirra, Ólav Trygvasyni, og ger teimum kunnugt, at kongur hevur sett hann at hava vald í oyggjunum.



**Bøndurnir fóru til annan stað.**
***(Ing. av Reyni)***

Hetta var fyrri partur av røðuni, og tað var ikki stórvegis mótstøðu, hesi tíðindi fingu.

Sigmundur tekur aftur at tala og sigur fólkinum frá, at hann hevur tikið siðaskifti og er kristin maður.

«Og nú eri eg komin higar í teimum ørindum frá kongi várum at snúgva tykkum til ta rættu trúnna.»

Tá tók Tróndur til orða, at líkligast var, um bøndurnir fyrst talaðu seg til sættis, áðrenn støða varð tikin í tílíkum vandamáli.

Hetta var einki at siga til, og bøndurnir fóru

til annan stað á tingvøllinum at tosa um málið. Tað var Tróndur, sum átti orðið, og hann segði við bøndurnar, at teir skuldu sýta fyri at taka við hesi nýggju trúnni. Og hann fekk bøndurnar at samtykkja, at trýst skuldi verða lagt á Sigmund, at hann ongatíð aftur skuldi vága sær at bera hesa læruna upp á mál; um hann ikki játtaði hesum, tóku teir og drópu hann.

Á odda fyri bóndaliðinum, ið hevur vápnini á lofti, fer hann aftur til Sigmund og sigur honum avgerðina, teir hava tikið.

Sigmundur sær, at lið hansara er ov fáment; hann orkaði onga mótstøðu at gera, og so bindur hann seg til at lata Føroya fólk hava sína gomlu trúgv í frið.

Eftir hetta fer Sigmundur heim til Skúvoyar. Hann er heldur enn ikki í døpurhuga; hann kennir, at hann er kúgaður, og at Tróndur og lið hansara eru við yvirlutan.

Men í huga sínum, hugsa vit okkum, tók hann ta avgerð, at hetta skuldi koma Tróndi aftur um brekku.

Hesin fundurin í Tinganesi var ár 999.

*Arbeiðsuppgávur:*

1. Hvat ár bar Sigmundur kristniboðini til Føroya?
2. Nevn ein prest, hann hevði við sær!
3. Greið frá fundinum á Tinganesi!
4. Hvar sat Sigmundur henda veturin?

## 20. FØROYAR VERÐA KRISTNAÐAR

Veturin tók at halla, og tað fór at líða móti vári. Tá mannar Sigmundur skútu sína við tríati manna liði og leggur frá landi. Líkindini eru av teim ringastu, ið hugsast kunnu, við hørðum streymi og rokstormi; men hetta var júst veður, sum hóskaði til ta ætlan, Sigmundur hevði.

Leiðin lá norðureftir. Hetta var vandaveður; men nú skuldi annaðhvørt komast fram ella farast í ódnini.

Tað eydnaðist skútuni at koma um íður og vandamiklan sjógv; teir lendu í Eysturoynni, uttan at nakar varnaðist tað. Teir komu til Gøtu, slógu ring um garð Tróndar, brutu inn á hann, har hann lá og svav, og leiddu hann út í tún.

Tá tekur Sigmundur til orða: «Tað er nú



«Drep meg ikki so skjótt!»
*(Ing. av Reyni)*

soleiðis háttað, Tróndur, at tað eru ymsir, ið eiga. Seinasta summar kúgaði tú meg, tá ið eg bar fram ta kristnu læruna. Og nú vil eg bjóða tær tvinnar kostir at velja ímillum: annar er tann, at tú tekur við tí kristnu trúnni og letur teg doypa, hin er, at tú verður dripin, og so fert tú eymur og armur niður til heljar.»

«Eg vil ikki svíkja mínar fornu vinir,» svaraði Tróndur.

Maður var so fingin at hálshøgga Trónd; men tá ið hann brá øksini at geva honum banahøggið, segði Tróndur: «Drep meg ikki so skjótt! Eg vil tala við Sigmund frænda.» Sigmundur kom til staðar, og Tróndur játtaði tá at lata seg doypa.

Men Tóri tekur soleiðis til orða: «Høgg hann niður, maður! Um Tróndur sleppur hesa ferð, er stórur vandi fyri, at hann verður okkum at bana.» Til hetta svaraði Sigmundur, at hóast tað tóktist hættisligt, fór hann kortini at royna at lata Trónd sleppa við lívinum.

Ein prestur varð so fingin at doypa Trónd og alt húsfólk hansara.

Tá ið Sigmundur fór úr Gøtu, hevði hann Trónd við sær. Og síðani ferðaðist Sigmundur bygd úr bygd í Føroyum, og hann gavst ikki, fyrr enn hann hevði kristnað alt fólkið í oyggjunum.

Soleiðis vórðu Føroyar kristnaðar.

*Arbeiðsuppgávur:*

1. Hvar fer Sigmundur komandi vár?
2. Hvørji vóru ørindi hans?
3. Greið frá tilgongdini í Gøtu!
4. Hvar fór Sigmundur so?
5. Hvør má sigast at hava kristnað Føroyar?

# 22. DEYÐI SIGMUNDAR

Tróndur var fullur av hevndarhuga móti Sigmundi.

Hendinga ferðir hevði hann roynt at komið Sigmundi so nær, at hann kundi geva honum bana; men tað hevði altíð miseydnast hjá honum.

Nú ger Tróndur seg aftur til at veita honum bana, elvdur av dreymi, hann sigur seg hava droymt.

Tróndur fær stórt lið við sær, ikki færri enn seksti mans, og allir vóru av raskastu monnum. Á tveimum skipum fer hann ein seinan heystardag stevnandi móti *Dímun*. Hann fer tigandi fram; hvørki Sigmundur ella nakar av hansara monnum hava hoyrt minsta kis um atsóknina.

Tað eydnast Tróndi at lenda í øllum góðum, og so varð farið upp á oynna. Har stendur varðmaður Sigmundar; hann hevur ikki sæð, tá ið Tróndur lendi, og nú er ov seint at renna heim at varskógva Sigmund. Eldjarn Kambhøttur



Sigmundur og menn hansara berjast móti Tróndi og hansara monnum.

***(Ing. av Reyni)***

leggur á varðmannin, og í næstu løtu fara báðir bóltandi út av hamrinum, har teir doyðu.

Nú liggur leiðin niðan í garð Sigmundar.

Tróndur og menn hansara kringseta garðin og herja á bæði við eldi og vápnum. Sigmundur berjist sum ein leyva og menn hansara á sama hátt, ja sjálvt *Turid*, húsfrúgvin, tekur vápn í hendi og stríðist sum ein maður. Sigmundur dugir skjótt at síggja, at lið hansara er ov fáment, og í øllum ruðuleikanum eydnast honum, Tóra og Einari at sleppa til rýmingar og krógva seg.



Tá leyp maður yvir um gjónna.
*(Ing. av Reyni)*

«Hvussu leingi vilt tú berjast við høvuðleysar menn?» rópar tá Turid út til Trónd. Hann skilir beinan vegin, hvat hon sipar til, og ger seg til at fara at leita eftir Sigmundi.

Sagt er, at Tróndur hevði evni at snodda eins og hundur; hann kundi tí fylgja slóð teirra, har hon gekk niðan á oynna, niðan móti eini gjógv. Myrkt var, so Tróndur kundi ikki síggja niður í gjónna; hann rópar tí: «Ert tú nakar maður, Sigmundur, so kom nú fram!»

Tá leyp maður yvir um gjónna og skuldi høgga eftir Tróndi, men í myrkrinum mistók hann seg og høgdi næsta mannin, *Steingrím úr Eysturoy*. Síðan leyp maðurin øvutur yvir aftur um gjónna.

«Har fór Sigmundur!» rópar Tróndur, og alt lið hansara fylktist fyri at gera av við Sigmund.

Ytst úti á hamrinum, niðri við gjáarmunnan, vóru teir tríggir, Sigmundur, Tóri og Einar, nú staddir. Ongan veg slapst, tí fíggindarnir vóru framman fyri teir í stórum tali.

«Nú mugu vit taka vápnini og verja okkum

manniliga,» sigur Tóri. «Ikki fái eg vart meg, tí svørðið datt mær úr hendi, tá ið eg leyp yvir um aftur gjónna,» svarar Sigmundur.

Teir fóru oman á hamaran, dygst móti sjónum. Tríggir brestir hoyrdust; tað vóru teir tríggir, sum lupu á bláman fyri at svimja til Suðuroyar.

Tróndur hoyrdi brestirnar. «Har fóru teir,» rópar hann, og so biður hann teir manna bát og fara eftir teimum.

Við longum, seigum svimjitøkum leggja teir tríggir frá landi. Ætlanin var at vinna Suðuroynna upp, hóast tað var ein long leið hagar, fýra drúgvir fjórðingar.

Alt gekst teimum væl, til teir vóru komnir



Komnir hálva leið.
*(Ing. av Reyni)*

hálva leiðina fram. Tá var megin hjá *Einari* uppi. «Nú skiljast vit,» sigur hann, «eg eri ikki mentur meira.»

Sigmundur tekur hann á bakið, og so flytur hann Einar eitt strekki. Tá sigur Tóri: «Hvussu leingi ætlar tú tær at flyta deyðan mann?» Sigmundur, sum nú sær, at Einar er deyður, sleppur honum, og nú svimja teir tveireinir, til bert ein fjórðingur er eftir til lands. Tá var megin hjá *Tóra* uppi; hann orkaði ikki meira. «Sigmundur frændi! alt lív okkara hava vit fylgst, fylgst í miklum kærleika; men nú er løtan komin, at vit mugu skiljast.»

Sigmundur sigur, at hann skal royna at svimja við honum, eins og hann gjørdi við Einari.

«Vit vóru saman í mangari ferð,
ei mín frændi skiljast vit her.»

Sigmundur tekur hann so á bakið og svimur tað seinasta strekkið við honum.

Men tá ið teir koma undir Suðuroynna, er brim. Megi teirra er uppi, og hin sterki súgurin hevur teir tí stundum móti landi, stundum útfrá, og her skolast Tóri av herðunum á Sigmundi og druknar.

Enn tveitist Sigmundur oman og niðan í briminum; men so einaferð eydnast tað honum at koma upp á turt og grulva niðan gjøgnum fjøruna og leggja seg í eina tarabrúgv á mølini.

Har var bygd; *Sandvík* æt hon. Eittans hús var, har *Torgrímur illi* búði við synunum *Ormsteini* og *Torsteini*.

Teir hava verið niðri í fjøruni, og har hava teir funnið Sigmund, og teir fara heim aftur at siga pápanum frá.

«Inn koma dreingir og siga frá,
stórur maður í tara lá.»

Torgrímur tekur øks í hendi og fer skundisliga oman í fjøruna.

Sigmundur sigur, hvør hann er, og hvussu sær hevði gingist, og at enda biður hann Torgrím hjálpa sær.

«Lágt er høvdingur vár nú staddur,» hevur Torgrímur fyri munni á sær. Men tá ið hann sær ring Sigmundar, fær hann ikki stýrt sær; hann má ognast hann.

«Torgrímur talar til sveinar sín:
«Gullringur Sigmunds skal vera mín.

Dreingir, tit haldi mær í hans hár,
meðan eg gevi honum banasár.»»



Líkið teir gróvu í sand og grús.
*(Ing. av Reyni)*

Dreingirnir andøvdu ímóti; men pápin vann. Sigmundur varð so vegin, ringur og klæðir hansara rænd, og so gróvu teir líkið undir ein moldbakka. Og tá ið seinni lík Tóra rak upp á land, tóku teir og jarðaðu tað undir liðini á Sigmundi.

«Líkið teir gróvu í sand og grús,
men ringin bóru teir heim til hús.»

*Arbeiðsuppgávur:*

1. Hvat er ætlan Tróndar?
2. Hvussu gekst varðmanni Sigmundar?
3. Sig frá atsóknini á garðin!
4. Hvussu endaði bardagin?
5. Sig frá svimjingini um Suðuroyarfjørð!
6. Hvørja bygd náddi Sigmundur til?
7. Sig frá bana hansara!

# 23. LAGNA TORGRÍMS ILLA

Ólavur Trygvason hevði einaferð sagt, at hesin ringurin skuldi verða Sigmundi at bana, og hesi orðini vóru nú trúliga sannað. Men hvør ið var banamaður Sigmundar, visti eingin; har varð gitt og gitt, men eingin visti nakað við vissu.

Torgrímur illi royndi at fjala øll merki av illgerð síni. Ringin krógvaði hann so væl, sum til bar, og tað tóktist, sum tað ongantíð skuldi koma upp, hvat ið verið hevði Sigmundi at bana.

Gekk nú nøkur tíð. Tá talaði Tróndur ein dagin við Leiv Øssursson, at hann ætlaði at fáa hann giftan, og at tað var *Tóru,* dóttur Sigmund Brestissonar, hann hevði ætlað honum. Leivur svaraði, at hann væntaði sær lítið burtur úr hesum bønarorðum. Teir fara kortini ein dagin til Skúvoyar, men móttøkan var, sum vera man, ógvuliga kaldlig.



Leivur og Tróndur bera fram bønarorð í Skúvoy.
***(Ing. av Reyni)***

Tá ið teir høvdu borið fram bønarorðini, svarar Tóra, at áðrenn hon játtar at giftast við Leivi, má hann fáa greiði á, hvat ið hevði verið faðir hennara at bana.

Sostatt fara teir av stað aftur úr Skúvoy.

Á øðrum sinni mannar Tróndur skútu sína og leggur frá landi. Hesa ferð skal hann eitt sindur longur enn seinast; nú liggur leiðin til Sandvíkar.

Torgrímur tekur blídliga ímóti teimum og býður Tróndi innar í stovuna, meðan hinir sessast har uttari.

Torgrímur undrast á, hvørji ørindi Tróndar mundu vera; men tá ið Tróndur snýr tosið inn á Sigmund Brestisson, og hvat ið av honum man vera vorðið, roynir hann at látast óvitandi um alt.

Tróndur sigur seg hava varhugan av, at Torgrímur er ikki ósekur í drápi Sigmundar, og hóast hesin noktar fyri øllum, verða kortini bæði hann og synir hansara tiknir á hondum og bundnir.

So er sagt, at Tróndur ikki skuldi vera heilt eiðasørur í gandakynstrinum, og nú skal hann royna seg, so greiði kundi fáast á, hvat ið elvt hevði bana Sigmundar.

Tróndur letur menn sínar kynda stórar eldar í skálanum, og so setir hann seg á ein stól nær loganum.

«Hurðin gekk so harðliga ......»

Soleiðis sigst í kvæðinum.

Maður kemur inn, rennvátur. Allir kenna mannin: hetta er Einar suðuroyingur. Hann rættir sínar vátu hendur yvir ímóti eldinum, steðgar eitt sindur á, fer so út aftur sama vegin, haðani hann var komin.

«Hurðin gekk á øðrum sinni ......»

Soleiðis heldur kvæðið fram.

Allir kendu, hvør ið tað var, sum hesa ferð kom inn í skálan: hetta var Tóri. Hann sýnir somu atferð sum Einar; eisini hann fer yvir at eldinum, rættir hendurnar yvir ímóti honum og sleppur sær so út aftur.



Hetta var sjálvur Sigmundur Brestisson.
*(Ing. av Reyni)*

«Tað leið ikki longur um
eina so lítla stund,
tá gekk hurðin so harðliga,
sum alt hevði gingið í grund.»

Maðurin, ið nú kom inn, var stórur og ógvuliga blóðdálkaður; hann var høvuðleysur, bar høvur sítt í hendi. Kortini kendist hann: hetta var sjálvur Sigmundur Brestisson, høvdingur millum høvdinga. Hann steðgar eitt bil á gólvinum; so fer hann út aftur sama vegin, hann kom.

Nú reisist Tróndur úr sessinum. Hann talar við menn sínar um hetta, teir allir hava sæð. Teir tosa sínámillum um, at fyrst er Einar lagstur fyri; hann var kraftaminstur av teimum. Síðani er Tóri sjólátin; men Sigmundur, ið sýndi seg blóðdálkaðan og høvuðleysan, er komin á land, og har hevur onkur funnið hann og givið honum banahøgg.

Og meðan Torgrímur og synir hansara halda á við at siga seg ósekar, býður Tróndur monnum sínum at leita og rannsaka, um einki vitnisprógv kundi finnast har í húsinum.

«Sigmundur átti ein stóran ring,
hann var av reyðargull,
kunnu tit hann hjá Torgrím finna,
so er sakin full.»

Har varð leitað bæði ovarlaga og niðarlaga og alt uttan úrslit.

So koma teir fram á eina kistu; teir lyfta lokið av henni, men har tykist einki at vera uttan rusk og spjarrar. Teir hvølva so kistuna. Har finna teir eitt knýti av spjørrum, og tá ið teir loysa tað upp, síggja teir okkurt, ið glógvar út ígjøgnum spjarrarnar.

Tað er ein *ringur*, ringur Sigmund Brestissonar. Nú høvdu teir fullgott prógv móti Torgrími illa. Hann skilti, at tað batti ikki at dylja nakað longur; hann mátti viðganga alt.

Tá ið Tróndur og menn hansara fara haðani, hava teir Torgrím og synir hansara við sær. Síðani stevnir Tróndur føroyingum til tings, og



Jarðarferðin í Skúvoy.
*(Ing. av Reyni)*

har noyðist Torgrímur at siga frá allari tilgongdini. Teir tríggir vórðu hongdir á tingstaðnum, og soleiðis endaði teirra ævi.

Tá vóru longu líkini á Sigmundi og Tóra uppgrivin, flutt heim til Skúvoyar og jarðað við kirkjuna, sum Sigmundur hevði reist har.

Stutt eftir tað stóð brúdleypið hjá Leivi og Tóru Sigmundardóttur.

# 25. LAGNA GØTUSKEGGJANNA — DEYÐI TRÓNDAR

Á garði Tróndar í Norðagøtu gekk nú aftur ein smádrongur og spældi sær. Hann mundi ivaleyst hava tað ein góðan mun betri enn teir báðir dreingirnir, ið høvdu verið undan honum, og sum fyrr er sagt frá.

Hesin drongurin æt *Sigmundur*, sonur *Leivs* og *Tóru Sigmundardóttur*.

Tað tóktist, sum tað fór at koma til ilnar millum gøtuskeggjarnar og Leiv, og tí gjørdu faðirin og móðirin av, at tey skuldu fara til Gøtu og fáa hin níggju ára gamla Sigmund heim aftur.

Tey fara so í bát og sigla norður til Gøtu. Veðrið er ótespiligt, og tey eru tí sjódálkað, tá ið tey leggja at landi í Gøtu,

Tað skal ikki sigast annað, enn at Tróndur var blíður við tey; tey sita bæði heitt og fjálgt á Gøtugarði. Tóra og sonurin fara innar í stovuna, og har høvdu tey so nógv at tosa um, tí tey høvdu ikki sæst so leingi. Mamman vil hava at vita, hvat hann hevði lært hjá Tróndi, og tað vísti seg ikki at vera so lítið. Hann dugdi bæði hesa og hasa lógargreinina uttan á fingrunum.



Leivur og Tóra vórðu boðin til borðs í Gøtu.

*(Ing. av Reyni)*

«Hevur Tróndur lært teg nakað í gudsfrøði?» spyr hon.

Tann lítli Sigmundur lesur so faðirvár á latínskum máli fyri mammuni; síðan lesur hann trúnaðarorðini.

Gángat ek einn út,
fjórir mèr fylgja,
fimm guðs einglar;
ber ek bøn fyrir mèr,
bøn fyrir Kristi,
sýng ek sálma sjø,
sjái guð hluta minn! *)

---

*) Sí sálmabókina nr. 390.

Síðan varð boðið til borðs. Har var bæði matur og drekka, og tá ið út líður á kvøldið, er kæti á øllum sum í veitsluhøll; ein hin kátasti av øllum er Tróndur. Men nú er niðurfaringartíð. Tróndur biður tey reiða ból á gólvinum til gestirnar; sjálvur skal hann so fara í skemmu sína og hava dreingin við sær.

«Dreingin vil eg hava hjá mær í nátt,» sigur Tóra, og hóast Tróndur er trekur til tess, verður tað hon, ið fær vilja sín.

Tá ið alt er niðurfarið, og friður er undir lonini, biður Tóra Leiv fara um oynna við monnum sínum at bróta hol á hvørt far, so einki er sjóført. Teir so gera.

Tá ið dagur er komin, fara Tóra og Sig-



Húskallar Tróndar manna bát.
*(Ing. av Reyni)*

mundur oman á støðna, meðan Leivur fer inn í skemmu Tróndar at biðja farvæl og takka fyri blíðskap.

Hann sigur eisini, at mamman vil hava dreingin aftur við sær. Hetta vil Tróndur ikki ganga við til á nakran hátt, og tá ið Leivur gongur skundisliga oman á støðna og skjýtur bátin frá, býður Tróndur húskøllum sínum at manna bát og fáa tey aftur at landi.

Men teir eru ikki meir enn komnir út á flot, nú stendur kolbláur fossur upp ígjøgnum bátin. Teir noyddust skundisliga aftur til lands, og tá ið teir ikki funnu nakað heilskapað far at halda av stað við, slapp Leivur við bátsskipan síni lættliga frá teimum og kom vegin fram í øllum góðum.

Tað varð nú brátt, at rættiligt stríð brast á millum Leiv og gøtuskeggjarnar, og í hesum bardaga feldi Leivur allar tríggjar skyldmenn Tróndar: *Sjúrð Tollaksson, Geyta reyða* og *Tórð lága.* Tá ið Tróndur frætti um deyða teirra, tók hann sær hetta so nær, at hann syrgdi seg til deyða.

Og nú var Leivur Øssursson mætasti maður í Føroyum.

*Arbeiðsuppgávur:*

1. Hvørjar dreingir fostraði Tróndur?
2. Hvørji komu at vitja Sigmund?
3. Greið frá, hvat ið Tróndur hevði lært hann!
4. Sig frá gestablídni Tróndar!
5. Hvat gjørdu Leivur og menn hansara hesa nátt?
6. Sig frá lagnuni hjá skyldmonnum Tróndar og hansara egnu lagnu!
7. Hvør var nú mætastur í Føroyum?